# AIG bjargað frá húsagangi

Troyggjusponsorurin hjá Manchester United, American International Group, hvørs partabrøv kavaðu mánadagin, er bjargað frá húsagangi av amerikanska centralbankanum. Partabrævakursurin fall mánadagin við 61 prosentum, men nú fær AIG eitt lán frá amerikanska centralbankanum upp á 444 milliardir krónur, móti at bankin yvirtekur 80% av AIG, skrivar euroinvestor.dk. Avtalan er ein roynd at forða fyri tí órógvi, sum hevur rakt altjóða fíggjarmarknaðirnar í kjalarvørrinum av kollapsinum hjá íløgubankanum, Lehman Brothers.



# Pensjónsfeløg undir trýsti

Meðan fíggjarkreppan leikar í, hava danir orsøk at bera ótta fyri pensjónsuppsparingini. Tí kreppan kann enda við, at geva nøkrum av pensjónsfeløgunum álvarsamar trupulleikar, ljóðar. Hjá Forsikring og Pension fylgir forstjórin, Per Bremer Rasmussen, væl við gongdini. – Tað eru hend nøkur drastisk partabrævakursfall í longri tíð. Eingin veit, hvat hendir, men tað er greitt, at um partabrævakursirnir framhaldandi falla, so kann eg ikki útilokað, at eitt felag kann fáa trupulleikar, sigur Per Bremer Rasmussen sambært dr.dk



*321 veljarar hava atkvøðurætt til fólkaatkvøðuna. Her koma tveir teirra á valstaðið*

# Avgerðin um samanlegging fellur í dag




*Valstýrið til reiðar at taka ímóti veljarunum – vinstrumegin Súsanna Christiansen, Ásla Sørensen og Gunnvør Eliasen*



*Gullak Nýggjagarð úr Hvannasundi var annar veljarin, ið greiddi atkvøðu á valstaðnum*

**»Taka tygum undir við at Hvannasunds kommuna og Klaksvíkar kommuna verða lagdar saman í eina kommunu?«, ljóðar spurningurin. Í kvøld fæst svarið uppá henda**

FÓLKAATKVØÐA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Hvannasund:** Í morgun klokkan 10 læt valhølið í skúlanum á Fossánesi upp.

Í dag skulu íbúgvararnir í Hvannasunds kommunu nevniliga taka støðu til, hvørt kommunan skal fara upp í Klaksvíkar kommunu og sum seinni verður til ta stóru Norðoya Kommunu.

Fyrsti veljarin kom fimm minuttir eftir at valhølið lat upp, og tann næsti eina lítla løtu seinni. Ikki fyrrenn eftir klokkan 20 í kvøld verður greitt, um fólkið hevur somu hugsan sum meirilutin í bygdaráðnum sum fegin vil leggja saman við Klaksvík.

Líkt er til, at fólkið í kommununi gera sína skyldu, tá val hava verið hildin. Vanliga er valluttøkan uppá 90 prosent til kommunuval og løgtingsval.

Í kommununi búgva 436 fólk, og av hesum hava 321 teirra valrætt í dag – 190 í Hvannasundi, 128 í Norðdepli og 3 í Múla.

Ein av limunum í valstýrinum, Súsanna Christiansen upplýsir, at higartil eru innkomnar 14 brævatkvøður.

### Tilgongd

Í eina tíð hevur verið arbeitt við hesi ætlanini, og hava nógvir fundir verið hildnir millum umboð fyri báðar kommunurnar.

Ein ætlan um eina tilgongd varð gjørd, og eftir henni skuldi fyrst ein borgarafundur haldast mánakvøldið og síðani skuldi fólkaatkvøðan haldast í kommununi.

Eftir at úrslitið av fólkaatkvøðuni verður greitt í kvøld, skal bygdaráðið viðgera tað á einum eykafundi í annaðkvøld. Og síðani verður næsta og avgerandi stigið tikið.

Verður tað so sum meirilutin í bygdaráðnum ætlar og sum býráðið í Klaksvík ætla, verða tær fimm bygdirnar í Hvannasunds kommunu partur av Klaksvíkar kommunu á nýggjárinum.